# Vandi fyri at landsliðið koblar úr

**Jákup Mikkelsen heldur, at tað hevði verið rætt at goymt umfør í landskappingini inntil landsdystirnir vóru spældir, og fleiri venjarar eru av tí áskoðan, at tað hevði verið betri at spælt fótbólt um heystið enn um várið**

LANDSLIÐIÐ
*Jóannes Hansen*

Í morgin fer fótbóltslandsliðið av landinum. Setningurin er stórur. Leygardagin skulu teir spæla í Litavia, og mikudagin í komandi viku fara teir at standa andlit til andlit við týsku varaheimsmeistararnar.

– Hetta er spennandi, men eg kvígi fyri, um vit vera so væl fyri, sum vit kundu havt verið.

Tað er annar av málverjunum, Jákup Mikkelsen, sum sigur hetta, og hann útgreinar sítt sjónarmið soleiðis:

– Mínar royndir eru, at spælararnir eru ikki so væl tunaðir inn á landsdystirnar, sum eru á skránni eftir kappingarlok í Føroyum, sum teir eru til dystirnar, ið eru á skránni, meðan landskappingin framvegis er á skránni. Tá vit vóru saman til dystin ímóti Skotlandi, vóru spælararnir heilt væl fyri. Tað noyddust teir at

*– Mínar royndir eru, at spælararnir eru ikki so væl tunaðir inn á landsdystirnar, sum eru á skránni eftir kappingarlok í Føroyum, sum teir eru til dystirnar, ið eru á skránni, meðan landskappingin framvegis er á skránni, sigur Jákup Mikkelsen millum annað undan komandi landsliðsferðini*

at teir eru tað. Trupulleikin er, at teir sinniliga eru meiri ella minni úrkoblaðir. Spenningurin um gull og Europa Cup er útloystur, fleiri vóru í veitslu leygarkvøldið, og eg veit ikki, um teir hava runnið mánadagin og týsdagin, áðrenn teir í morgin fara avstað við landsliðnum.

*Men ger hetta so nógv, tá teir hava vant síðani í januar?*

– Tað ger ikki so nógv, men tað skal so lítið til. Um vit ikki eru hundrað prosent á toppinum, so gongur tað útyvir heildina, og so fáa vit sovorðin úrslit, sum vit eitt nú fingu í Sveis, tá kappingin var liðug.

Í Noregi spæla teir álmanakkakapping, akkurát sum tað verður gjørt í Føroyum. Har eru tvey umfør eftir av hesum kappingarárinum. Tey verða spæld, tá spælararnir koma aftur frá landsdystunum, sum eru á vera, tí avgerandi umfør í landskappingini stóðu fyri framman. Leygardagin var síðsta umfarið á skránni í landskappingini. Spælararnir eiga at vera væl fyri kropsliga, og eg ivist ikki í, annan mikudag.

– Hetta ger, at teir eru hundrað prosent tunaðir inn á landsliðsuppgávurnar. Teir hava ikki sinniliga koblað úr, og tað sást aftur, heldur Jákup Mikkelsen.

### Eiga at umhugsa broytingar

Í KÍ leikskránni undan heimadystinum ímóti GÍ segði royndasti føroyski venjarin, Johan Nielsen, at hann var av tí áskoðan, at føroyska fótbóltsárið átti at verið forskotið, soleiðis at tað varð farið undir fótbóltin seinni enn nú, og at tað varð hildið fram longri út á heystið.

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ og hjálparvenjari á landsliðnum síðani 1996 er samdur í hesum sjónarmiðnum:

– Vit fara undir venjingarnar í januar, og fyrsta umskránni fyrst í mai. Tað er nóg mikið við fyrireikingum í 6–8 vikur. Steypakappingin eigur at vera á skránni, men hon verður altíð órógvað av kava og illveðri.

*Hvat skal so gerast?*

– Tað hevði verið vert at umhugsað sjónarmiðið hjá Johan Nielsen.

*Kvígur tú fyri, at landsliðsspælararnir ikki eru nóg vel fyri?*

– Tað eiga teir ikki at vera. Teir hava nógvar royndir og vita, hvat tað snýr seg um, tí longu tá teir fóru undir fyrireikingarnar til nýggja árið, vistu teir, nær fótbóltsárið fór at verða liðugt. Tá vistu landsliðsspælararnir, sum framvegis nógvir eru teir somu, a tteir skuldu spæla í Litavia og Týsklandi fyrst í oktober Men vandin fyri tí, sum Jákup Mikkelsen sig ur, er alla tíðina har. Hann er ikki vorðin minni eftir at allt fleiri spælarar á landsliðnum eru úr føroysku kappingini og ikki úr útlendsku kappingunum, sum teir vóru tað fyri nøkrum heilt fáum árum síðani, sigur Jógvan Martin Olsen at enda.

# IM-kapping á Viðareiði

**Okkara Ol-telvarar og útlendskir tittulhaldarar fara í døgunum 12.- 16. oktober at telva eina lukkaða IM-kapping á Hotel Norð á Viðareiði. Ein sera góð upphiting hjá føroysku telvararunum nú tað stundar móti Talvolympiaduni**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Leingi hevur tað ligið í luftini, men ikki fyrr enn viku síðani bleiv greitt at kappingin verður veruleiki. Talvsamband Føroyar við Rana Nolsøe á odda, hevur saman við dananum Mogens Nielsen arbeitt við hesari ætlan síðani miðskeiðis í summar. Mogens hevur sum altjóða talvdómari góðar kontaktir, og er altíð íðin at arbeiða fyri føroyskari telving at frama.

### Luttakarar

| | | | |
|---|---|---|---|
| IM | Kim Pilgaard | DEN | 2432 |
| IM | Jörg Blauert | GER | 2418 |
| IM | Björn Ahlander | SWE | 2393 |
| FM | John Arni Nilssen | FAI | 2385 |
| IM | Ole Jakobsen | DEN | 2381 |
| FM | Jørn Sloth | DEN | 2340 |
| FM | Heini Olsen | FAI | 2248 |
| | Olavur Simonsen | FAI | 2239 |
| | Eyðun Nolsøe | FAI | 2236 |
| | Hans Kr.Simonsen | FAI | 2231 |

*(FM tittulin stendur fyri FIDE-meistari, telvarar yvir 2300)*

Tíverri liggur ikki fyri hjá OL-telvarunum IM John Rødgaard og Martin Poulsen at luttaka. Tí bleiv Ólavur Simonsen boðin við, samstundis sum annar IM´ari skuldi finnast. Hesin kemur úr Týsklandi.

Tað eru serligar lógir galdandi fyri tilíkum lukkaðum IM-kappingum. Eitt nú skulu eitt ávist tal av IM´arum luttaka, eins og fýra ymiskir nationalitetir eiga at verða umboðaðir. Eisini skal miðalratingin liggja á ávísum høgum støði. Kappingin á Viðareiði uppfyllur øll hesi krøv.

### Seks stig gevur IM-norm

Kappingin er ein sokallað Kategori IV (miðalratingin er 2330) kapping, sum merkir at seks stig av teimum nníggju møguligum gevur IM-norm. Allir fimm føroysku telvararnir kenna seg hava ein møguleika til tess, og tað kunnu vit eitt nú takka John Arna Nilssen og Flóvin Tór Næs fyri, sum í summar prógvaðu at tað ber til at ogna sær normar. Tann mentali múrurin sum leingi hevur forðað okkum, er brotin. Torført verður tað ivaleyst hjá okkara monnum, men als ikki ógjørligt.

Leygardagin 12. oktober verður fyrsta umfar leikt, og síðani verða tvey talv leikt um dagin næstu fýra dagarnar. Hetta letur seg gera við nýggju FIDE-tíðini, áljóðandi 1,5 tíma til alt talvið + 30 sekundir eyka fær ein fyri hvønn leik ein flytir. FIDE-tíðin verður somuleiðis nýtt í Talvolympiaduni, 26.okt. – 10. nov.

Meira verður at frætta um kappingina á www.faroechess.com. Undir kappingini verður heimasíðan regluliga dagført við tíðindum, talvum osv.

### EM fyri unglingar

Sum einasti føroyingur luttekur Martin Poulsen í EM fyri unglingar, sum verður leikt í Spania. Martin telvar í bólkinum fyri dreingir 18 ár og yngri, og væl hevur gingist. Hann hevur hálvtfjórða stig av sjey møguligum, har mótstøðan hevur ligið um 2370 – 2270. Níggju umfør verða telvað.

n r rf lk
t | SMS
[illegible]



EB/Streymur-GÍ 1-2 (0-1):

# Vissa og óvissa á Mølini

**Við sigrinum fingu gøtumenn vissu um, at teir næsta ár spæla við í InterToto Cup-kappingini, og við ósigrinum mugu sundalagsmenn bíða eftir tveimum dystum móti sandoyingum, áðrenn lagnan í 1. deild er avgjørd**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tað, sum í longri tíð hevur sæð út sum yvirlivilsi hjá EB/Streymi, fekk leygardagin eitt skot fyri bógvin, tí á evsta leikdegnum í hesum kappingarárinum duttu sundalagsmenn niður um strikuna á stigatalvuni.

Av tí at Skála óvæntað vann sín dyst á Toftum móti B68, samstundis sum EB/Streymur mátti lúta fyri GÍ, ið hevði sín europeiska kjans at spæla fyri, verður tað EB/Streymur, ið skal spæla upp- og niðurflytingardyst móti B71, sum bleiv næstfremst í 2. deild.

Uttan iva er hetta ein strika í rokningini hjá teimum av sundalagsmonnum, ið høvdu trúð, at teir langt um leingi kundu fara í vetrarfrí frá øllum fótbólti.

Samstundis sum dysturin á Eiðismøl leygardagin gjørdist eitt lítið afturstig fyri heimaliðið, fegnaðust gestirnir úr Gøtu sjálvandi stórliga um sigurin, ið gav GÍ vælumtókta fjórðaplássið.

Sigurin tryggjaði GÍ pláss í InterToto Cup-kappingini, og verður hetta níggjunda ferðin, at GÍ skal royna seg sum føroyskt umboð uttan fyri landoddarnar í europeisku kappingunum.

### Trýst á báðum pørtum

Jú, sanniliga vóru fyritreytirnar ymsar undan dystinum á Eiðismøl leygardagin, tá EB/Streymur í síðsta landskappingarumfarinum á hesum sinni tók móti GÍ.

Heimaliðið, sum saknaði karantenurakta Sorin Anghel og skadda Ronnie Samuelsen, legði bragdliga fyri, tí umráðandi var at fáa stig í dystinum — og helst øll trý.

Men somu treytir lógu á Europa-svongu gestunum, ið komu til Eiðis uttan Magna Jarnskor og Suna Olsen, ið báðir høvdu karantenu.

Sum tað leið út á fyrra hálvleik, var tað GÍ, sum hevði bóltin meira. Trýstið gav eitt nú nøkur hornaspørk, uttan at kortini teir stóru málmøguleikarnir spurdust burtur úr yvirvágini.

Men tá 24 minuttir vóru farnir, fekk GÍ løn fyri stríðið. Í samanspæli við Krzystof Popczynski eydnaðist Sámali Joensen at sleppa ígjøgnum og skora, og so var 1-0 til GÍ.

Í seinni hálvleiki helt GÍ-trýstið fram, men mest við hálvum kjansum. Hesa løtuna var sterkasta vápnið hjá EB/Streymi at fara í mótálop, men heldur ikki við nóg stórum broddi.

Hinvegin vóru sundalagsmenn ikki seinir at taka av, tá teir umsíður fingu sín møguleika at koma innaftur í dystin. Hetta var eitt gott korter fyri tíð, tá EB/Streymur fekk fríspark beint uttan fyri brotsteigin hjá GÍ, eitt sindur úti í høgru síðu.

Í staðin fyri at skjóta innfyri, setti Eyðfinn Joensen vinstra fót undir bóltin, fekk hann upp um verjumúrin hjá GÍ og niðuraftur heilt úti í handara málkróki, uttan at Hallur Hansen fekk vart fyri, og so var javnleikur 1-1.

### GÍ kundi vunnið meira

Síðstu løtuna royndi heimaliðið at fáa eitt mál aftrat, men tað eydnaðist ikki. Hinvegin fekk GÍ bæði eitt mál aftrat og gyltan møguleika at vinna sannførandi.

Einir átta minuttir vóru eftir at spæla, tá verjan hjá EB/Streymi royndi at rudda bóltin burtur eftir eitt GÍ-álop. Men bólturin endaði hjá Súna Fríða Johannesen, sum royndi seg móti heldur ikki snýta tvær ferðir, men bjargaði skotinum frá Sámali Joensen, so dysturin endaði 2-1.

Sum longu nevnt, merkti sigurin InterToto Cup-atgongumerki til GÍ næsta ár, meðan EB/Streymur noyðist at spæla tveir dystir móti B71, áðrenn greitt er, hvat av teimum báðum liðunum verður í 1. deild næsta ár.

Ikki er endaliga avgjørt, nær hesir báðir upp- og niðurflytingardystirnir verða spældir. Kanska endar tað við, at báðir verða spældir mitt í viku heldur enn tveir leygardagar, nú fjallboð møguliga eru eftir fleiri av væl vandu spælarunum…

### Dysturin í tølum

**EB/Streymur-GÍ 1-2 (0-1)**
0-1: Sámal Joensen, 24.
1-1: Eyðfinn Joensen, 72.
1-2: Súni Fríði Johannesen, 82.
Dómari: Palli Augustinussen
EB/Streymur: Gunnar á Steig — Hallur Jacobsen, Andrzej Pacek, Christian Carlsson, Eyðfinn Joensen — Teitur Joensen, Bárður Olsen, Jákup Martin Joensen, Marni Djurhuus, Hans Pauli Samuelsen — Jón Sigurð Gleðisheygg
GÍ: Hallur Hansen — Leivur Hansen, Bartal Eliasen, Høgni Madsen — Hans Pauli Petersen, Sámal Joensen, Zdzislaw Janik, Jóan Petur Olsen, Bárður á Lakjuni — Súni Fríði Johannesen, Krzystof Popczynski

*Gøtumenn tryggjaðu sær sína 11. europeisku luttøku, tá teir vunnu á Mølini, og EB/Streymur skal brádliga fyrireika seg til at spæla um rættin til fótbólt í bestu deildini*

# Beinleiðis eftir gullinum

*Tá tað gongst liðnum somikið lætt, er lætt at stuðla, og Sólbjørn Thomsen var eisini í góðum lag, meðan hann gekk og kravdi pengar inn á suðuroyarferðini hjá HB-stuðlunum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sólbjørn Thomsen er nýggjur formaður í HB-stuðlum, og enn hevur tað so bara gingið sum eftir ánni hjá honum**

STUÐLAR
*Jákup Mørk*

Tað var vorin sum byrjan, sum nýggi formaðurin í HB-stuðlum, Sólbjørn Thomsen, fekk í nýggja sessinum. Fyrsta dystin undir hansara leiðslu kundu stuðlarnir fegnast um meistaraskapin, og sunnudagin skipaði hann so fyri fyrstu ferðini, tá HB skuldi til Tvøroyri eftir gullinum.

### Fellur lætt

Umborð á bátinum fingu vit orðið á Sólbjørn, meðan hann gekk og savnaði inn pening frá teimum, sum høvdu teknað seg til ferð og døgurða, og tó at hann hevði úr at gera, so hevði hann eisini stundir til eitt stutt prát.

Spurdur, um tað ikki kundi vera nóg so stríggið at vera formaður í einum slíkum áhugafelag, segði hann, at tað helt hann ikki. Í øllum førum ikki ein slíkand dag.

- Tá tað gongst somikið væl, so so fellur tað altíð lætt at gera tingini, so tað er als ikki nakað, sum eg hugsi um. Eg geri tað bara, helt hann fyri. Tað verður kanska nógv at takast við onkuntíð, men ein slíkan dag er tað so eingin trupulleiki.

Sum navnið á felagnum sigur, so hava HB-stuðlarnir til endamáls at stuðla HB. Áhugabólkurin er fullkomuliga óheftur av bóltfelagnum, men hinvegin royna teir so á ymsan hátt at stuðla bæði felagnum og leikarum.

- Tað er so nógv, sum vit stuðla við. Eitt nú plaga vit at lata nakað, tá yngru liðini fara av landinum í fótbóltsørindum, men eisini í aðrar mátar royna vit at vera til hjálpar. Eitt nú hava vit stuðlað, tá ungir HB-leikarar eru farnir uttanlands í útbúgvingarørindum, og sjálvandi er hetta nakað, sum vit vóna fer at koma felagnum til góðar.

Og at felagið hevur nógv tiltøk, til tess at fáa pengar til vega, tykist lítil ivi vera um.

- Ja, vit royna at gera eitt sindur av hvørjum. Bingo og neytmykjukapping hava verið fastir táttir seinnu árini, og í vetur fara vit ætlandi eisini at hava sjavskappingar, og í november fara vit so at hava størsta tiltakið, sum stuðlarnir nakran tíð hava havt, men akkurát hvat tað verður, farið eg ikki at siga her, sigur nýggi formaðurin at enda.